SHEFA-2 kaðalin:

# Størsta einstaka íløgan nakrantíð

**Seinnapartin mánadagin skrivaði Føroya Tele undir tríggjar sáttmálar við veitarar, um at leggja nýggja fjarskiftiskaðalin SHEFA-2 millum Føroyar og Skotland umvegis Hetland og Orkneyoyggjarnar. Hetta verður gjørt fyri at tryggja framtíðar samskiftistørvin, og er størsta einstaka íløgan hjá Føroya Tele nakrantíð**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Teir 730 kilometrarnir av kaðali kosta 120 mió kr. at leggja*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Føroya Tele byrjaði ársins triðju viku við at skriva undir ikki færri enn tríggjar sáttmálar, sum eru grundarlag fyri størstu einstøku íløguna hjá Føroya Tele nakrantíð. 120 milliónir krónur kostar tað at leggja kaðalin frá Føroyum til Skotland umvegis Hetland og Orkneyoyggjarnar.

Føroya Tele hevur í rúma tíð arbeitt við fyrireikingunum í verkætlanini. Gongst sum ætlað verður 730 kilometrar langi kaðalin liðugur og klárur í summar, og so tikin í nýtslu í oktober í ár.

## Avloysarin til Cantat-3

Í mars 2004 varð FARICE fjarskiftiskaðalin, sum er kaðalsambandið úr Íslandi til Føroyar og so víðari til Skotlands, tikin í nýtslu. Síðani FARICE kaðalin varð lagdur, er tørvurin á samskiftisorku, t.d. breiðbandsnýtslu, nógv øktur.

Tað er ein sannroynd, at tørvurin bara fer at vaksa í framtíðini, og tí ásannar Føroya Tele, at støðugt og álítandi samband til útheimin er alneyðugt, sum tað verður sagt í tíðindaskrivinum, sum er sent út til miðlarnar.

Um FARICE kaðalin verður óvirkin, so er fjarskiftisorkan á CANTAT-3, sum er álitið, tá FARICE kaðalin ikki riggar, alt ov lítil til at nøkta samskiftistørvin til og frá Føroyum.

Haraftrat hevur kaðalslitið á CANTAT-3 í løtuni víst vaksandi váða, við ikki at hava eitt gott og trygt sjókaðalsamband aftrat FARICE kaðalsambandinum.

Tí er neyðugt við einum við tryggum og álítandi kaðali aftrat, og tað skal SHEFA-2 vera, siga tey í Føroya Tele.

## Nøktar tørvin fyri nógv ár

Í oktober hava Føroyar so aftur tvey dygdargóð fjarskiftissambond við útheimin. Kaðalin, sum er Føroya Tele eigur fullkomiliga einsamalt, tryggjar at uttanlandssamskiftistørvurin hjá føroyingum verður nøktaður nógv ár framyvir.




# Oljan setti dagsskránna

MARKNAÐARRÁK

*Vika 3, 2007*

Sum væntað gjørdist hendan farna vikan hendingarík á marknaðunum, og tað var fyri stóran part oljan, sum var í andgletti. Prísurin á olju helt á at lækka, eitt skifti var hann heilt niðri á 51 dollarum fyri tunnuna. Hetta var tað lægsta, oljuprísurin hevur verið síðan juni ’05. OPEC hevur fleiri ferðir hetta seinasta árið boðað frá, at londini fóru at skerja framleiðsluna fyri at fáa prísin upp. Men londini hava ikki gjørt sum tað varð sagt, og tí hava fráboðanirnar frá OPEC oftast ikki havt nakra ávirkan á prísin. Formaðurin segði aftur hósdagin, at londini fara at skerja framleiðsluna. Áhugavert verður at síggja, um tað riggar hesuferð. Lági oljuprísurin er við til at halda eini hond undir partabrævakursunum.

## Lánsbrævarentur hækka

10-ára lánsbrævarentan er nú 4,02%, og hon er hækkað 0,10% hesa farnu vikuna. Sum sæst á myndini er langa rentan hækkað um 0,30%-stig síðan fyrst í desembur. 1-árs rentan er enn hægri, 4,2%.

## Góð tíðindi frá Lundbeck

Oljuprísurin hækkaði eitt vet fríggjadagin og tað fekk oljupartabrøv, sum í seinastuni hava liðið undir lækkandi oljuprísum, at hækka nakað aftur. Danska heilivágfyritøkan Lundbeck kunngjørdi í farnu viku, at Svøríki hevur góðkent Cipralex fyri tunglyndi og hetta kann væntandi økja søluna. Góðu tíðindini gera at partabrævið er áhugavert, men havast skal í huga, at tað er tengt at stórum váða, tí fleiri tíðindi kunnu væntast frá fleiri av teirra stig-3 verkætlanum í 2007, sum kunnu fara báðar vegir.

## Hesa vikuna

Hendan vikan verður væntandi rættiliga áhugaverd á marknaðunum. Prísvøksturin bæði í Evropa og USA verður kunngjørdur. Hann hevur nógv at siga fyri miðbankarnar og rentugongdina, og hetta er júst tað, sum marknaðirnir hava lagt stóran dent á seinasta hálva árið. Harumframt verða eyguni havd við oljuprísinum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 576,05 | 0,7% | ↑ |
| JPY | 4,78 | -0,7% | ↓ |
| GBP | 1.131,47 | 2,0% | ↑ |
| NOK | 89,57 | -0,7% | ↓ |
| SEK | 82,10 | 0,3% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,22 | -0,2% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 127,91 | 2,4% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 552,00 | -0,9% | ↓ |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,33 | 0,6% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*